# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Undirsjóvartunlar til fólkaatkvøðu

DÁVID ISFELD



Einar tvær vikur síðan varð almannakunngjørt, at árið 2007 var eitt sjáldsama inntøkuríkt ár fyri landskassan. Hetta kunnu allir føroyingar bert frøðast yvir. Men so koma árinini av slíkum valaári: Politikararnir verða meira ella minni samdir um at gera undirsjóvartunlar fyri 2000 miljónir yvir tey komandi 10-15 árini. Eitt gott ár gevur politikarunum árræði til at gera íløgur, sum faktiskt krevur eina 15 ára-røð av góðum inntøku árum. Slíkar íløgur – í einum landi við so óstinnum inntøkugrundarlagi sum Føroyar hava – er so stutt hugsað og ábyrgdarleyst, og er hetta greiður boðskapur um, at alt ov nógvir politikarar vanta politikskt skyn, førleika og vísdóm.

**Meirilutin vil hava gott heilsuverk**
Tá fólk verða spurd, hvat tey hámeta og halda vera týdningarmiklasti lutur í vælferðasamfelagnum, siga tey flestu, at heilsan hevur størsta týdningin og sostatt eisini heilsuverkið. Men í politiska heiminum ræður stór líkasæla hvat heilsuverkið viðvíkur. Viðlíkahald av heilsuverkinum er ikki nokk; tað skal menning til: menning til starvsfólkið (bæði persónlig menning, skeið og tílíkt, eins og fleiri starvsfólk), meiri pening til neyðugan heilivág og syrgja fyri, at mest møgulig viðgerð fæst í Føroyum. Hetta krevur pening, sum kann fáast til vega, um tað ikki verða ov nógvir pengar tiknir úr landskassanum til frama fyri koyrikomfort - undirsjóvartunlar.

**Løgmaður máðar støðið undir síni egnu visjón**
Visjón 2015 legði serstakligan dent á, at Føroyar gerast eitt vitanarsamfelag. Hetta veit ein og hvør krevur góðar skúlar t.e. gott og rúmligt umhvørvi (og ikki barakkir), javna menning av lærarum, dagført frálærutilfar og nýggjar útbúgvingar. Lítið hevur verið gjørt á hesum øki, og undanfarna og sitandi samgonga, við Jóanesi Eidesgaard sum løgmann í báðum førum, máðar støðið undan skúlamenningini við lyfti um undirsjóvartunlar fyri 2000 miljónum í nærmastu framtíð. Tað er mær ein gáta og eitt vónbrot, at so nógvir føroyingar vilja hava fleiri ára gomlu vanrøktina av heilsuverkinum og skúlaverkinum at halda á fram til frama fyri koyrihentleikar. Skulu okkara børn og tey sjúku bøta fyri óneyðugar koyrihentleikar? Hava "tunnilspolitikararnir" og onnur samsint samvitsku til tað?

**Trivnaður fyrst**
Trivnaður fæst ikki við vegasambandi einans. Vit mugu fyrst av øllum syrgja fyri, at barnafamiljur trívast í Føroyum. Eg havi fyrr skrivað um hvussu óneyðugt dýrt tað er at liva í Føroyum. Tá so eisini barnaskúlarnir eru ov vánaligir (serstakliga skúlar í lítlum bygdum), hvat skal tá gera tað trivaligt og jaligt hjá barnafamiljum at búseta seg í Føroyum? Lesandi, sum koma heim, hava longu eitt netverk av vinum og øðrum í útheiminum, og er tað tí lætt og lokkandi at rýma av landinum aftur, tá fávitskukenda mannagongdin á Tingi eins og millum (tíverri) ov nógv fólk heldur á fram. Hóast met-høgt fólkatal og heimflyting í løtuni stúri eg fyri huglagnum millum ungu familjurnar og hugburðin á Tingi. Útlit eru fyri einari daprari framtíð í Føroyum, um hesin trupuleikin at skapa nøktandi karmar til barnafamiljur ikki verður tikin í álvara NÚ. Útset tunlarnar og skapi trivnað í Føroyum. Um 2000 barnafamiljur við 5000 børnum rýma av landinum yvir tey næstu 15-20 árini, hvussu nógvir pengar halda tit tá vera í landskassanum? Hvussu nógv gomul fólk eru ikki tá eftir, ið hava brúk fyri heilivág, viðgerð og bústaðir? Hvussu verður trivnaðurin í einum barnfátækum samfelag? Føroyar eru við at gerast eitt einsamalt og ófruktbart træ, ið spakuliga følnar.

**Politiskur impotensur ella fólkaræði?**
Politiski ódugnaskapurin, ella vantandi fyrilit fyri restina av neyðugu ábótunum, sum landskassin má gjalda, fær meg at mæla til, at skipað verður fyri einari fólkaatkvøðu, hvørt vit vilja hava undirsjóvartunlarnar nú, seinni ella yvirhøvur ikki. Tá politikararnir ikki hava dirvi til at hyggja tunnilsfólkini í eyguni og siga NEI til tunlar NÚ, so má FÓLKIÐ fáa tann møguleikan. Vit eru fleiri, ið ikki vilja bera fíggjarligu byrðuna, sum tunlarnir leggja á okkum, vegna impotentar politikarar og barnsligar og sjálvsøknar borgarar, sum fyrilitarleyst bara vilja hava. Hvørjir pengar skulu t.d. rinda tað MVG'ið, sum møguliga skal takast av ávísum matvørum til frama fyri trivnaðin? Hvørji trivnaðar tiltøk kundu ikki verið gjørd tey næstu 10 árini fyri 2000 miljónir krónur? Tá Føroyar kunnu tyngjast fíggjarliga so nógv tey næstu mongu árini til frama fyri koyrimarglæti hjá einum minniluta í Føroyum, so haldi eg, álvaratos, tað einasta rættvísa vera at skipað verður fyri einari fólkaatkvøðu – javnbýti og fólkaræðinum at frama.

## Minniluta stjórn – ja, hví ikki?

TORDUR J. NICLASEN
løgtingsmaður



Tvørpolitistiskt samstarv: Í politisku skipan okkara, er tað ein sannroynd,at ein meiriluti finnur saman, ger samgonguskjal og myndar eina samgongu. Hesi skipa so landsstýrið. Hin parturin verður so í minniluta – ella í andstøðu.

Grundað á samgonguleistin leggur so landsstýrið mál fyri tingið, sum vanliga vinna frama við undirtøku av samgongulimum. Hóast andstøðuni stendur frítt at stuðla ella taka undir við landsstýrisuppskotunum, so er tað tó ein sannroynd, at hon mangan ikki ger tað!

Nú veldst um uppskot og her eigur at havast í huga, at tað er samgongan, sum í skjali hevur sett kósina og leggur ætlanir samsvarandi. Ein "heildar politikkur" sum ætlandi skal fremjast í einum valskeiði. Tí má tað vera skiljandi, at um uppskot frá andstøðuni hava órógvandi, fyri ikki at siga, forðandi ávirkan á politisku ætlanir samgongunnar, ja, so er tað eyðsæð, at tey ikki kunnu rokna við at fáa undirtøku frá samgonguni.

Samgongan hevur eitt "samgonguskjal". Andstøðan hevur einki "andstøðuskjal" – og førir heldur ikki nakran niðurfeldan "heildarpolitikk"

**Spurningur um raðfesting**
Spurningurin er eisini um raðfesting. Í "heildarætlan" samgongunnar, er tað ikki vist, at andstøðan raðfestir á sama hátt(um hon í heila tikið raðfestir) sum samgongan. Hetta kann so eisini vera ein orsøk til, at andstøðu uppskot ikki vinna frama, sjálvt um uppskotini kunnu tykjast skilagóð í sjálvum sær.

**Bólturin má sparkast**
Fortreytin fyri slíkum samstarvi er, at spælararnir leggja áherðslu á, at sparka "bóltin" og ikki at sparka hvønn annan á skinnabeinið.

Slíkt tvørpolitiskt samstarv hevði av sonnum staðið sína roynd í eini "minniluta" stjórn. Í 10 ár megnaðu danskir politikarar á sinni undir leiðslu Schlüters slíkt samstarv! Aðrir hava somuleiðis megnað tað!!

**Neyðugt við hugburðsbroyting**
Nú fortreytirnar hjá samgonguni tykjast broyttar , er gylt høvi at royna eina "minniluta stjórn". Eitt slíkt samstarv hevði ført við sær, at møguleikin fyri "breiðum semjum" øktist, sum uttan iva uppá longri sigt vildi verið samfelagsgagnligt. Kanska kom slík roynd eisini at gerast grundarlag fyri framtíðar politiskum stabiliteti.

Neyðugt er við hugburðsbroyting skal slíkt eydnast og stillar hetta stór krøv til partarnar, samstundis sum havast má í huga, at slíkt tvørpolitiskt samstarv eydnast bert í mun til politiskan búnaskap , dirvi og viljan hjá avvarðandi politikarum at skriva søgu og royna slíkt politiskt áralag..

*Eiði, tann 24. juli 2008*

## Bíblian innblást av Gudi – ikki mannaorð um Gud

### Tríatiundi annar partur

RICHARD DANIELSEN



Zachariasar bók er deild upp í fjúrtan kapitlar. Hann sær sjónir , eina fyri og aðra eftir, men boðskapurin er hin sami. Hann sær, eins og Haggai, aftur á dómin, sum nú hevur verið, hann profeterar um dómin, sum liggur framman fyri, har Gud sigur, at tey skulu verða herleidd til allar tjóðir. Hann hevur ein náðiboðskap til fólk sítt, men hóttir heidningatjóðirnar.

Í triðja kapitli sær hann Josva høvuðsprest í skitnum klæðum, og Satan áklagar hann, men eingilin, sum stendur hjá, biður teir lata Josva úr teimum skitnu klæðunum og í rein klæði. Eingilin segði við hann: "Eg havi tikið misbrot títt burtur frá tær." Hetta er myndatala. Tey skitnu klæðini eru synd hansara. Ikki so undarligt, at kapitulin endar við einum lyfti um Messias.

Hoyr nú, Josva, høvuðspresturin! Tú og vinir tínir, ið sita her framman fyri teg, tit eru fyriboðarar, at Eg skal lata tænara Mín Kvist koma.

Tí steinurin ið Eg havi lagt framman fyri Josva, yvir hesum steini vakja sjey eygu. Eg risti í hann innskriftina, ið hann skal hava - sigur HARRIN Gud herskaranna - og eftir einum degi taki Eg burtur misbrotið hjá hesum landi.

Tann dag - sigur HARRIN Gud herskaranna - skulu tit bjóða hvør øðrum til veitslu undir víntrænum og fikutrænum."

Fjórði kapitul sigur frá, at tingini henda ikki við styrki menniskjans, men við Anda Guds. Fimti kapitul byrjar við dómi yvir synd. Seinra helvt, í hesum kapitli, kundi sæð út til at vera, um royndirnar menniskja ger í dag við at fara út í rúmdina. Har lesa vit um eitt efumál, sum kvinna sæt í, og eingilin segði við Zacharias: "Hatta er gudloysi og fýrdi hana niður efumálið og klamsaði blýlokið á. Vit vita frá bábelstorninum, at Gud hatar slíkt. Hetta efumálið, her talast um, er eitt rúmdar far. Tí er nærliggjandi at hugsa, at tað er eitt profeti um rúmdarførini í dag. Legg til merkis, efumálið fer út í rúmdina. Har eru tvær aðrar kvinnur, tær lyfta efumálið upp millum jørð og himmal. Hesar báðar eru ikki vanligar kvinnur, tær hava storkaveingir og eina øðiliga megi. Kanska kallast tær kvinnur, tí tað eru vanligar kvinnur, ið standa aftanfyri hesa veldigu kraft. Vit vita jú, at nú í tíðini koma kvinnurnar meiri og meiri fram, tað hava longu verið kvinnur úti í rúmdini. Kvinnan hevur nú leingi strongt á at koma út á arbeiðsmarknaðin, tær velja hann fram um at verða heima hjá børnunum, sum er størsta gávan og arbeiðið, ið í hvussu er, ein mamma kann gera. Stovnarnir kunnu ikki erstatta tann miss, ið tað er fyri børnini, at bæði mamman og pápin eru frá teimum meginpartin av tíðini. Legg til merkis eitt avtrat. Hvar fóru tær við efumálinum. Til Sinearsland, og hon skal verða sett niður har á stað sítt.

Til eftirtanka! ----- Bábel lá í Sinearslandi smb. 1. Mós.10,10.

Hatta vóru nakrir hugleiðingar. Alt orð Guds er givið okkum til lærdóm. Tí kann ikki vera skeivt at gera sær sínar tankar um alt , sum skrivað stendur, og tað sum vit ikki kunnu siga við fullari vissu um, sum her t.d, at soleiðis skal tað skiljast, mugu vit ikki sjálv gera til eina læru, men tað má liggja opið. Ein og hvør kann so gera sær sínar tankar um tað.

Í sætta kapitli lesa vit aftur um dóm yvir heidningar og profetorð um Messias.

Í sjeynda kapitli finna vit í seinasta versi, at Zacharias, sum jú livdi í millum tey herleiddu ,sum heimaftur vóru komin, aftur profeterar dóm yvir fólkið. Eg havi longu nevnt tað omanfyri. Hetta var ikki nakað nýtt, sum Zacharias profeteraði, hinir profetarnir høvdu jú profeterað, at Ísrael skuldi verða herleitt til allar tjóðir. Hesin dómurin gekk út, tá ið Titus legði Jerúsalem í oyði ár sjeyti eftir Krist og brendi tað seinra templið av, og fólkið spjaddist runt um allan heimin.

Framhald.